

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 01 - 2012

# Japan keypir minni olju úr Iran

Japan, sum er eitt av londunum, ið hevur keypt nógva olju úr Iran, hevur sett sær fyri at keypa minni olju frá iranum í framtíðini. Tað kunngjørdi japanski fíggjarmálaráðharrin, Jun Azumi, tá hann hevði havt fund við amerikanska starvsbróður sín. Timothy Geitner, í Tokyo í gjár. Á hesum fundinum legði amerikanski fíggjarmálaráðharrin áherslu á, at tað er umráðandi, at Japan er við í teimum handilstiltøkunum, sum eru sett í verk ímóti Iran, og sum hava til endamáls at noyða iranar at gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Jun Azumi svaraði, at japanski oljuinnflutningurin úr Iran hevur verið minkandi tey seinstu fimm árini, og at stjórnin í Tokyo hevur gjørt av at skarva uppaftur meiri av honum í komandi tíð. Japan er tað næststørsta oljukeyparalandið hjá Iran, men í seinastuni hevur landið biðið onnur arabisk lond økja teirra framleiðslu, so Japan kann keypa olju frá teimum ístaðin fyri. Á ferðini í Fjareystri hevur Timothy Geitner eisini verið í Beijing, men har fekk hann lítið burturúr. Kina hevur tvørturímóti funnist at londunum, sum hava sett tiltøk í verk ímóti Iran. Kinesarar siga, at handilstiltøk loysa ikki kreppuna, men at samráðingarleiðin er tann einasta rætta. ? ?